# ÞYGGIR HÚS Í ARABISKU EMIRATUNUM

**DREYMAUPPGÁVA** Arkitekturin Kári Thomsen, sum millum annað teknaði Grønlendingahúsið í Havn, er farin undir eina stóra uppgávu í einum býi millum Dubai og Abu Dabhi. Hann skal byggja fleiri hús har

Randi Jacobsen

Arkitekturin Kári Thomsen gjørdist ikki sørt kløkkur, tá ið hann ein dag fekk ein fyrispurning frá ríkmanninum Mohammed Al Nahyan í býnum Mina Jabal Ali í Arabisku emiratunum. Spurningurin var, um hann ikki vildi koma niður til emiratini at byggja nøkur hús.

Tað vísti seg, at stóri hotelleigarin onkursvegna hevði funnið fram til heimasíðuna hjá Kára Thomsen og har sæð myndir av Grønlendingahúsinum og av teimum smáu húsunum, sum Kári Thomsen læt byggja oman fyri Kvívík. Haraftat av líknandi húsunum, sum Kári Thomesen hevur teknað og eru sett upp í Danmark.

Fleiri útlendsk arkitektatíðarrit hava eisini havt greinir og myndir av ariktekturi hansara.

## Hóskaði til arabiska umhvørvið

Fyrispurningurin var, um hann ikkiu kundi byggja eini 30 hús beint við eitt nýtt hotell hjá ríkmanninum, sum helt, at hús sum Grønlendingahúsið hóskaðu væl til teirra umhvørvið við teimum mongu moskéunum, ið hava kuplar.

Kári Thomsen legðist ikki á boðini, men tað tók umleið eitt hálvt ár at fáa sáttmálan í hús.

Avtalan var, at fyrst skuldi byggjast eitt stórt hús og so tvey smærri uppat tí stóra.

Kári Thomsen setti seg í samband við eina træverksmiðju i býnum Taasinge á Fyn, og henda verksmiðja átók sær at gera elementini.

Trupult var at finna eina loysn av, hvussu elementini skuldu fáast úr Danmark til Mina Jabal Ali, tí tey vóru ov stóru til at kunna fara í vanligar bingjur. Loysnin var ein flatrck, ein stór bingja, men flutningurin kom harvið at kosta næstan 50.000 krónur og tók ein mánað.

Avtalan var, at alt skuldi gerast klárt frammanundan til at seta húsini upp, og Kári Thomsen skuldi hava eftirlitið við uppsetingini av húsunum.

## Byggja á sandi

Men tá ið Kári Thomsen kom niður í vár, var einki forarbeiði gjørt. Elementini vóru tó komin vegin fram.

Hotelleigarin hevði eisini gjørt av, at í staðin fyri at seta húsini upp við stóra hotell hansara, skuldu tey byggjast á eini sand strond, sum hann eisini átti fimm kilometrar longri eysturi. Hetta hevði hann valt fyri at geva ferðafólki tilboð um at kava, standa á vatnskí og tílíkt.

Her vil ríkmaðurin hava bygt 20 hús.

- Tað var ikki sørt ein avbjóðing at skulu byggja á eini sandstrond, sigur Kári Thomsen, sum fann útav at brúka betongplattar og so sokklar omaná. Tað arbeiðið tók eina viku at gera.

- Meðan Kári Thomsen var í emiratunum, búði hann á einum hotelli og hevði egnan bilførara. Hotelleigarin rindaði alt, tí tað var við í sáttmálanum. Hvønn morgun kundi hann fara oman í tann reina og heita sjógvin at svimja.

## Eitt knoss

Tað var eitt verri stríð at fáa tey stóru elementini upp á land, tí krani kundi ikki brúkast. Tey vóru tí lossað í land við handamegi.

Ein viku mátti ganga, frá tí at sokkulin varð settur upp, til arbeiðast kundi víðari, tí betongið skuldi torna.

Kári Thomsen var á byggiplássinum í fimm vikur, men hann kundi ikki verða verandi, og tí lærdi hann fólkið at seta elementini upp, áðrenn hann fór heim fyri góðum tveimum vikum síðan.

- Eg tosaði við teir so seint sum í dag, og teir eru í gongd við at seta húsini upp.

## Familjuelita

Maðurin, sum Kári Thomsen arbeiðir fyri, er ikki bara ein vanligur ríkmaður. Mohammed Al Nahyan er partur av familjuni, sum stýrir øllum landinum. Hann er systkinabarn Kalif bin Zayed Sl Nahyan, sum er forseti í landinum.

Kári Thomsen sigur, at Mohammed Al Nahyan var ein sera áhugaverdur og væl vitandi maður. Hann hevði universitetsútbúgving úr Englandi.

- Tá ið hann var úti alment, var hann í eyðkenda hvíta búnanum, men privat var hann ílatin sum tú og eg, sigur Kári Thomsen.

Ríkimaðurin var væl nøgdur við húsini, men hann broytti ætlanina eitt sindur, soleiðis at byggjast skulu 12-15 hús á tveimum plássum.

## Stórur áhugi

Kári Thomsen sigur, at meðan teir arbeiddu, vóru fleiri áhugað fólk og hugdu. Hann sigur, at næsta húsið, sum sett verður upp, skal klæðast við leiri, ið bjálvar. Leirurin heldur tí nógva hitanum úti um dagin og heldur hitanum inni um náttina.

- Eg fekk at vita, at um eg hevði hug, kundi eg eisini seta upp mítt egna hús har. So eg havi møguleikan at fáa mær summarhús í Arabisku Emiratunum, sum alla tíðina smílist, meðan hann greiðir frá síni sjáldsomu arkitektauppgávu.

- Bara tað at vera í Arabisku emiratunum var ein stór uppliving fyri Kára Thomsen, tí alt er so øðrisi. Alt er fyrsta klassa, eisini maturin.

- Teir útbúnu arabararnir tjena millum 50.000 og



**ARKITEKTUR**

*Kári Thomsen gjørdist ikki sørt kløkkur, tá ið hann varð biðin um at koma til Arabisku Emiratini at byggja hús*

*Mynd: Jens Kr. Vang*